Við Sosialinum
Í BÝIN

Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av

Les í býin hvønn hósdag !

Sosialurin

# Fulltrúi til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingar-myndugleiki, sum vísir til Løgmansskrivstovuna.

Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðslu-skrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.

Dagliga virksemi hjá dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðslu-skrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum. Ráðið ger egna reglugerð og nærri reglur um arbeiðsbýti millum ráð og avgreiðsluskrivstovu.

Uppgávan hjá Dátu-eftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini.

Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um, bert fer fram í samsvari við lógina og reglum ásettum við heimild í lógini.

Av øðrum uppgávun kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skráseting og víðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsókn-um um loyvir.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.

Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til skrivstovuna hjá dátueftirlitinum.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar so sum málsviðgerð, vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum, fyrireiking og tilrættisleggjan av fundum og málsviðgerð hjá ráðnum, dagføring av heimasíðuni við kunnandi tilfari, gera ársfrágreiðing og virkisætlan.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava útbúgving frá hægri læristovni. Tó kunnu eisini tey søkja, ið væntandi verða liðug næsta summar.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera miðvísir og hava góð samstarvsevni. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til edv og til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum, har møguleiki er fyri at hava ávirkan á arbeiðsuppgávurnar. Góðir møguleikar fyri upplæring og eftirútbúgving.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra ella Ingunn Eiriksdóttir fulltrúa tlf. 351010, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast
Løgmansskrivstovuni
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn

og skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi á middegi fríggjadagin 9. november 2001.



## Frá Eysturoyar Javnaðarfelag

Øll javnaðaráhugað eru vælkomin á limafund, sum verður í Bygdarhúsinum í Leirvík í kvøld kl. 20.

Við á fundinum vera Dan Petersen, Vilhelm Johannesen og Hendrik Old.

**Nevndin**

veitst tú ikki tað?

## HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera okkara hjúnabandsdag tann 14.7.2001 so hugnaligan og ógloymandi. Takk fyri fjarrit, gávur og blómur.
**Marita & Jógvan**



**Góða, elskaði mamma**
Hjartaliga tillukku við 23 ára degnum og alt tað besta í framtíðini. Eg elski teg.
**Kærastu heilsanir frá lítla ba**



**Góða dóttur og systir**
Hjartaliga tillukku við 23 ára degnum og alt tað besta í framtíðini.
**Kærastu heilsanir frá okkum øllum**



**Góða Anna Sofía**
Lukku og gleði á tínum 15 ára degi. Nú mást tú stýra chattingini. Vit gleða okkum at feira føðingardagin saman við tær. Alt tað besta.
**Kærar heilsanir, mamma og Søren**



## HEILSANIR



**Góða kona og mamma**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum ynskja
**vit trý**



**Góði, elskaði Eyðbjørn**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum ynskja
**vit øll í húsinum, omma og abbi**



**Góði Hans**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum, sum er í dag. Alt tað besta í framtíðini ynskja
**omma og abbi í Havn**



**Góða Lisbeth**
Tillukku við degnum 23.10. Vit elska teg.
**Heilsan, maður og børn**



**Góða fastir**
Hjartaliga tillukku við 23 ára degnum. Okkum leingist illa eftir tær, vit síggjast kanska næsta summar.
**Kærastu heilsanir Natalia og Mattias**



**Góða Elin**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 23. okt. ynskja
**mamma, babba, Kim Bogi og Hildur**



**Góða Anna Sofía**
Hjartaliga tillukku við 15 ára føðingardegnum 23.10. Tað var stuttligt, at tú var her í Føroyum í heystfrítíðini. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Kærar heilsanir, omma í Klaksvík**



**Góði Jóanis**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 21/10. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit her niðri gleða okkum at síggja teg til jóla.
**Kærar heilsanir, abbada, Anna Sofía, Sigrun og Søren**

**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«